Løgtingslóg

um

at veita landskassastuðul til Oyggjaleikirnar, sum verða í Føroyum í 2027

§ 1. Landsstýrisfólkið fær heimild til at lata upp til 15 mió. kr. í landskassastuðli til Ítróttasamband Føroya til fyrireiking av Oyggjaleikunum í Føroyum, sum verða í 2027.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2027.
Stk. 2. Samstundis sum løgtingslógin fær gildi, fer løgtingslóg nr. 61 frá 30. apríl 2018 um landskassatrygd fyri Oyggjaleikir í Føroyum úr gildi.

Samtykt á Løgtingi hin 21. mai 2024 við 26-0-3 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 23. mai 2024

stjóri